# Ársfrágreiðing 2022

## Virksemi

Vinnuframi varð settur á stovn sambært løgtingslóg nr. 81 frá 8. mai 2001 um Vinnuframagrunn. Endamálið hjá Vinnuframa er, at hann skal stuðla vinnuni í avmarkaðan mun - uttan at veita rakstrar- og íløgustuðul. Grunnurin stuðlar tiltøkum, sum fjøltátta vinnulívið og økja um nýtsluna av vitan.

Kunngerð um virksemið og umsitingina hjá Vinnuframa varð lýst 29. november 2001, har landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og Vinnumálum, samsvarandi vinnupolitikki Landstýrsins, staðfestir tey vinnugreinaøki, sum serligur dentur skal leggjast á at stuðla.

Umframt omanfyrinevnda virksemi, røkir Vinnuframi hesi øki:

- Umsiting og játtan hjá Filmshúsinum
- Umsiting og játtan hjá Tónleikaútflutningsstovuni
- Umsiting og játtan av Endurgjald til skipasmíð
- Umsiting og játtan av Endurgjald til filmsverkætlanir
- Játtan hjá Íverksetarahúsinum

Vinnuframi eigur og rekur eisini bygningin á Hoyvíksvegi 51, Tórshavn, sum verður leigaður út til granskingarparkina iNOVA.

Harumframt húsast skrivstovan hjá NATA, North Atlantic Tourist Association, í skrivstovuhølunum hjá Vinnuframa.

## Árið 2022

Stýrið fyri Vinnuframa legði dent á at stuðla ráðgeving, menning, sølu og heildarverkætlanir í 2022.

Vinnuframi hevur í 2022, umframt kjarnuøkið í grunninum, havt ábyrgd av játtanini og umsitingini hjá Filmshúsinum og Tónleikaútflutningsstovuni (FMX), endurgjald til skipasmíð, endurgjald til filmsverkætlanir og játtanini hjá Íverksetarahúsinum.

Í desember 2019 flutti skrivstovan hjá NATA úr Vinnuhúsinum inn á skrivstovuna hjá Vinnuframa. Endamálið hjá NATA er at fremja samstarvið innan ferðavinnu millum Grønland, Ísland og Føroyar. NATA veitir stuðul til samstarvsverkætlanir innan ferðavinnumenning og -marknaðarføring og ferðastuðul til skúlar, ítróttarútferðir og mentanarlig tiltøk millum londini.

Vinnuframi hevur ábyrgd av at røkja bygningin á Hoyvíksvegi 51, sum er leigaður út til granskingarparkina iNOVA. Í tíðarskeiðnum 2020-2022 hevur Vinnuframi gjørt umvælingar og ábøtir fyri tkr. 197.

Í 2011 varð Løgtingslóg nr. 59 frá 26. mai 2011, um at nýta part av stovnsfænum hjá Vinnuframa til at innrætta høli til granskingarsetur, viðtikin. Bygningurin hjá Vinnuframa varð í 2012 umbygdur til endamálið fyri umleið 10 mió. kr. Starvsstovutól fyri umleið 6,6 mió. kr. vórðu eisini fíggjað við stovnsfæi frá Vinnuframa.

iNOVA leigar í dag út til vinnufyritøkur og almennar stovnar, sum hava atgongd til skrivstovuhøli og nútímans starvsstovur og starvsstovutól. Eisini kunnu fyritøkur, granskarar og privat fólk leiga køkin, ið er løggildaður av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Eitt stórt høli, Høllin, verður leigað út til kanningarstovuna Thetis Sp/f, sum byrjaði nýtt virksemi innan koronukanningar í 2020.

Vinnuframi hevur verið eygleiðari á fýra nevndarfundum hjá Nordic Innovation í 2022. Tveir fundir vórðu hildnir á Teams. Fundirnir í apríl og september vórðu ávíkavist hildnir í Oslo og í Reykjavík.

Politiska skipanin í Føroyum hevur í 2022 gjørt avtalu um luttøku í Horizon Europe. Vinnuframi er National Contact Point fyri hesi øki undir Horizon Europe:

- The European Innovation Council (EIC) and European Innovation ecosystem
- European Institute of Innovation
- Technology og Digital, Industry and Space

Í hesum sambandi hevur Vinnuframi tætt samstarv við Granskingarráðið, sum hevur yvirskipaðu ábyrgdina av føroysku avtaluni við ES um Horizon Europe stuðulsskipanirnar.

30. mars luttók Vinnuframi á einum tiltaki um vinnuframaskipanir í Føroyum, sum Íverksetarahúsið skipaði fyri. Tiltakið varð hildið í hølunum hjá Íverksetarahúsinum í Klaksvík.

9. september varð tiltakið 'Frá heimamarknað til heimsmarknað' hildið í Finsen. Tiltakið var skipað sum samstarv millum Hugskotið, Framtak, Íverksetarahúsið og Vinnuframa.
Á skránni vóru tveir fyrilestrahaldarar úr Tel Aviv, Osnat Lautman og Benny Shlick. Osnat Lautman er ein altjóða viðurkendur serfrøðingur innan vinnumentanir og hevur skrivað bestseljandi bókina `Israeli Business Culture'. Benny Shlick er íverkseti og fyrilestrahaldari við drúgvum royndum innan start-ups, KT-vinnuna og íleggjaraumhvørvið. Tey bæði greiddu millum annað frá orsøkini til góðu úrslitini í ísraelska íverksetaraumhvørvinum, serliga innan KT-vinnuna. Harumframt greiddu føroysku KT-fyritøkurnar, Nemlia, Farpay og Globe Tracker frá teirra royndum og avbjóðingum á altjóða marknaðinum. Tvær ísraelskar fyritøkur vóru við í Føroyum. Tær høvdu báðar eisini eitt stutt innlegg á tiltakinum.

13. – 15. september luttóku Vinnuframi, Hugskotið og Íverksetarahúsið á ráðstevnuni 'TechBBQ' í Keypmannahavn, sum er liður í at fremja KT-vinnuna í Føroyum. Vinnuframi stuðlaði fimm føroyskum tøkni-fyritøkum, sum vórðu bjóðaðar við: Nemlia, Globe Tracker, Minteo, Centrego Marine Føroyar og Tøkni.

22. september varð tiltakið 'Patent og Copyright' hildið í Reinsarínum.
Rasmus Bjerring Offersen, uppfinnara-ráðgevi hjá Danmarks Teknologiske Institut, greiddi frá tilgongdini í samband við at verja vøruna, og í hvørjum føri, tað er skilagott at fáa sær patent.
Jakob Thors, løgfrøðingur hjá KODA og jazzbassistur, greiddi frá rættindunum hjá tónleikarum.
Katrine Schlüter Schierbeck, løgfrøðingur hjá The Law Factory, greiddi frá rættindum og avtalum, sum filmsframleiðarar skulu tryggja sær, tá farið verður undir at framleiða ein film.
Høgni Lisberg, tónleikari og stovnari av Mahogni Music Publishing, greiddi frá virksemi sínum, og hvussu føroyskur tónleikur kann gerast ein nátturligur partur av altjóða filmsframleiðslu.

29. desember høvdu Vinnuframi, Framtak og Íverksetarahúsið felagsbás á Jobmatch 2022 í Norðurlandahúsinum. Endamálið er at gera ung lesandi og arbeiðssøkjandi varhug við møguleikan at stovna egið virki og hvussu vinnuframaskipanin kann stuðla íverksetarum í hesum sambandi.

Íverksetaraportalurin, sum verður umsitin av Íverksetarahúsinum, varð tikin í nýtslu í apríl 2022. Á íverksetaraportalinum kunnu íverksetarar fáa yvirlit yvir vinnuframaskipanina og leinkjur til ymsu stovnarnar, sum kunnu veita ráðgeving og vegleiðing, tá farið verður í gongd við vinnuligt virksemi ella vinnuligar verkætlanir. Allir aktørar í Vinnuframaskipanini hava ábyrgd av, at heimasíðan verður dagførd.

Vitjað hevur verið hjá fleiri fyritøkum, sum Vinnuframi hevur stuðlað. Í tí sambandi eru filmsbrot og greinar um verkætlaninar løgd út á heimasíðuna hjá Vinnuframa. Sum dømi kunnu nevnast Tala & Hoyrn Sp/f við verkætlanini 'Samrøðuspælið' og Vøkstur ÍVF við verkætlanini 'Spírar og Sporar'. Sí meira á heimasíðuni https://vinnuframi.fo/prosjektir

57 umsóknir vórðu viðgjørdar í 2022 í mun til 48 umsóknir í 2021. Søkt varð um tkr. 8.567 í 2022 í mun til tkr. 5.636 í 2021.
Í stuðli vórðu í 2022 játtaðar tkr. 2.523 í mun til tkr. 2.484 í 2021. Afturførdur stuðul varð tkr. 892 í 2022.

Rentuinntøkurnar hjá Vinnuframa vórðu tkr. -2.462 í 2022 í mun til tkr. 1.129 í 2021.
Upprunaliga var ætlanin, at raksturin hjá Vinnuframa í stóran mun skuldi verða fíggjaður við rentuinntøkunum av stovnsfænum. Í hesum sambandi hevur rentan í peningastovnunum í Føroyum verið negativ seinastu árini. Vinnuframi hevur tí flutt meginpartin av tøka peninginum í Landsbankan, sum setir pengarnar í virðisbrøv. Virðisbrævamarknaðurin hevur tó verið óstøðugur seinastu árini og hevur tískil stóra ávirkan á tøka peningin til stuðul ár um ár. Rentan er sostatt ein sera óvissur faktorur í rakstrinum og kann, í besta førið, verða eitt gott íkast til raksturin og stuðulsjáttanina og, í ringasta førið, verða orsøk til eitt munandi rakstrarundirskot.
Gjaldførið, sum er hjá Landsbankanum, er í løtuni tkr. 28.237. Rentan varð -8,72% í 2022 íroknað umsitingargjald á 0,1%.

Vinnuframi er einasti grunnur í Føroyum, ið kann játta stuðul til allar vinnugreinar. Umsóknir um stuðul verða viðgjørdar á stýrisfundi átta til níggju ferðir um árið. Áhugin fyri menning, nýskapan og útflutningi til altjóða marknaðin er stórur, bæði hjá íverksetarum og meira etableraðum fyritøkum. Játtanin hjá Vinnuframa var 3 mió kr. í 2022. Hetta er ein lækking á tkr. 200 í mun til 2021.

Mett verður ikki, at játtanin fylgir við gongdini í samfelagnum og tørvinum á fígging. Tískil er talan um fleiri áhugaverdar størri verkætlanir, sum stýrið bert kann veita avmarkaðan stuðul til. Hetta er avgjørt ein avbjóðing fyri menning, nýskapan og vøkstur í Føroyum.

## Framtíðin

Í 2023 fer Vinnuframi at leggja dent á at stuðla verkætlanum innan ráðgeving, menning og sølu, samstundis, sum nýggja stuðulsskipanin Heildarverkætlanir eisini kann fáa ein part av stuðlinum.

Í viðgerðini av umsóknum um stuðul, verður dentur lagdur á, at verkætlanirnar hava eitt toymi við hóskandi førleikum, sum kann tryggja, at eitt búskaparligt burðardygt virksemi við vakstrar- og útflutningsmøguleikum kann fremjast. Í hesum sambandi er tað ein fyrimunur, at handilsmodellið er væl hugsað áðrenn farið verið í gongd, og at verkætlanin hevur jaliga ávirkan á vinnulívið sum heild í Føroyum.

Fyri at røkka málinum um, at allir føroyingar skulu kenna til Vinnuframa og Vinnuframskipanina sum heild, verður lýst regluliga á netmiðlunum og sosialu miðlunum.

Góða samstarvi millum stovnarnar í vinnuframaskipanini, til fyrimuns fyri íverksetararnar, mennist alsamt. Aktørarnir í Vinnuframaskipanini fara at samstarva um at skipa fyri fleiri spennandi tiltøkum 2023.

Fyri at fylgja upp upp á verkætlanirnar, fer Vinnuframi at vitja fyritøkur, sum eru komnar á mál við teirra verkætlan. Samstundis verða stutt filmsbrot og tíðindi av virkseminum framleidd og løgd út á heimasíðuna hjá Vinnuframa.

## Hagtøl fyri seinastu fimm árini







| | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ráðgeving | 939 | 517 | 90 | 163 | 110 | 1.819 |
| Menning | 1.108 | 459 | 1.973 | 1.374 | 1.226 | 6.140 |
| Søla | 483 | 1.467 | 620 | 647 | 1.027 | 4.244 |
| Heildarverkætlanir | - | - | 407 | 300 | 160 | 867 |
| Í alt | 2.530 | 2.443 | 3.090 | 2.484 | 2.523 | 13.070 |

